# FRELSTUR FRÁ GUDUM OG DJEVLUM

– **ÁTRÚNAÐURIN** ER ALLASTAÐNI, MEN SJÓNARMIÐINI HJÁ OKKUM FRÍTEINKJARUM SKULU EISINI FRAM Í LJÓSIÐ. TAÐ HELDUR TANN 74 ÁRA GAMLI **GUTTORMUR DJURHUUS**, SUM HEVUR TÝTT FÝRA BØKUR TIL FØROYSKT, SUM ALLAR FYRIHALDA SEG KRITISKT TIL ÁTRÚNAÐ, OG SUM ALLAR ERU KOMNAR ÚT Í ÁR.



**SAMRØÐA**
Heini í Skorini
heini_skorini@yahoo.com

– Upprunaliga byrjaði eg sjálvur at skriva eina bók um mína lívsáskoðan. Men hví skriva eina bók, tá onnur longu hava skrivað nógv betri bøkur um sama evnið? So setti eg meg í staðin at týða.

Maðurin hinumegin borðið situr og dukar við fingrunum niður í borðið. Hann hyggur fyri tað mesta niður. Og hann tykist ikki serliga glaður fyri at skula stilla upp til eina samrøðu.

Seinastu tvey árini hevur tann 74 ára gamli Guttormur Djurhuus arbeitt sjey dagar um vikuna við at týða fýra bøkur til føroyskt, sum allar eru komnar út í ár (sí faktakassa). Og felags fyri allar fýra bøkurnar er, at tær snúgva seg um religiónskritikk.

Bøkurnar eru í stóran mun týddar í friði og náðum á einum kamari á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, meðan Guttormur hevur verið í viðgerð fyri krabbamein. Seinastu boðini frá læknunum í summar vóru, at maðurin er frískur.

### Religiónskritikkurin manglar

Men hví hevur hann týtt júst hesar bøkurnar til føroyskt?

– Tað finst so lítið filosofiskt tilfar á føroyskum. Og tað finnast alt ov fáar føroyskar bøkur, sum eru atfinnandi yvir fyri átrúnaði. Átrúnaðurin er allastaðni, men røddin hjá okkum fríteinkjarum skal eisini fram í ljósmála, heldur Guttormur Djurhuus.

Við fríteinkjarum sipar Guttormur til tey, sum ikki trúgva á nakran gud. Og í fororðunum til einu bókina skrivar Guttormur, sum er útbúgvin evnafrøðingur, og sum hevur bústað í Kaldbak, at hann at kalla altíð hevur verið »frelstur undan átrúnaðarligum oki«. Og tað er hann glaður fyri.

Men er røddin hjá gudsavnoktarum so ósjónlig í hesum landinum? Hevur almenna kjakið um kristindómin ikki eins nógvar kritiskar sum stuðlandi røddir?

– Tann kvalifiseraði kritikkurin av átrúnaði er ógvuliga rárur. Og tað er sera langt ímillum, at nakar beinleiðis grundgevur fyri gudloysi í almenna kjakinum. Samstundis er hin vongurin dagliga sjónligur í almenna rúminum, sigur Guttormur Djurhuus.

> **Religiónin er ein trupulleiki, tá hon er intolerant. Tá hon roynir at kontrollera sínar umstøður. Tá hon trokar seg fram uttan at vera boðin**

### Ímóti gudleysari rørslu

Føroyski gudsavnoktarin metir, at átrúnaðurin fyllir ríkiliga nógv í almenna rúminum í Føroyum, serliga í skúlaverkinum og í fjølmiðlunum. Og hann er hart ímóti eini almennari statskirkju. At staturin velur sær ein ávísan átrúnað og ein ávísan átrúnaðarligan stovn fram um aðrar er sambært Guttormi í stríð við ásetingarnar um trúarfrælsi.

– Og tað verður heilt galið, tá kristindómurin kemur inn í tingið. Alt lógarsmíð eigur at byggja á nøkur objektiv kriteriir, sum skulu tryggja øllum borgarum – eisini minnilutum – tey somu rættindini, heldur Guttormur.

– Men átrúnaðurin finst allastaðni, og tí hava vit eisini brúk fyri sjónarmiðum, sum ganga øvugtan veg. Sum grundgeva fyri eini heimsmynd uttan ein gud. Og tí er týdningarmikið, at kritiskar bøkur um átrúnað eisini finnast á føroyskum. Eitt fjølbroytt útboð av ymsum hugmyndum er sjálv fortreytin fyri, at fólk kunnu hugsa frítt og sjálvi taka støðu til lívsins stóru spurningar, heldur Guttormur.

Hann er sannførdur um, at nógvir trúgvandi føroyingar ongantíð hava hoyrt kvalifiseraðan religiónskritikk, sum hvílir á einum filosofiskum grundarlagi.

– Tey flestu hava sjálvandi hoyrt um ateismu. Men tey hava ongantíð hoyrt nakran systematiskan kritikk av átrúnaði. Og at fáa til vega kritiskar bøkur um eitt so týdningarmikið evni hevur avgjørt verið ein drívmegi við mínum arbeiði at týða hesar bøkurnar, sigur Guttormur Djurhuus.

Í fjør var felagið Gudloysi stovnað. Ein felagsskapur, hvørs endamál er at markera, at gudloysi finst í Føroyum, og ein roynd at upplýsa, hvat tann ateistiska lívsáskoðanin snýr seg um – og ikki minst hvat hon ikki snýr seg um. Er nýggi felagsskapurin ikki eitt tekin um, at gudloysingar eisini hava sína rødd í Føroyum? Guttormur yppir øksl og sær ikki serliga hugtikin út.

– Jú, tað kann gott vera, men tað vísir seg mangan, at so skjótt sum fólk taka seg saman í bólkar, felagsskapir og rørslur, so halda tey uppat við at hugsa sjálvstøðugt. Tí vil eg als ikki bjóða slíkum felagsskapum vælkomnum.